

*Kabain í Mekka kløдd við svørtum klæði við muslimsku trúarjáttanini broderað á*



*Stríðsbúgvin Muhammed, persiskur málningur*

"Sanniliga eru vit kristin", sum bera størstan alsk til tey trúgvandi. At so er, er tí at millum tey eru prestar og munkar, sum ikki eru hugmóðigir."

## Kaba og bønarrætningur til Mekka

Fyrstu tíðina í Medina skuldi hin biðjandi muslimurin venda sær móti Jerusalem, men eftir ósemjurnar við jødarnar, varð stevnan broytt til Mekka.

Í Mekka var ein halgidómur nevndur Kaba. Kabain er eitt fýrhyrnt gróthús, sum er fyrndargamalt, og sum hevur ligið í sori og er endurreist fleiri ferðir. Koranin sigur soleiðis um Kabuna í 3. suru ørindi 90: "Fyrsta templið bygt til menniskja var so sanniliga tað í Mekka, ein vælsignan og ræ ttleiðing fyri allan heimin." Sambært Koranini varð Kabain fyrst reist av Abraham, men arabisk hevd sigur, at sjálvur Adam reisti Kabuna. Í landsynningshorninum av Kabuni er í múrinum ein svartur steinur, sum sigst at stava frá sjálvum Paradísinum. Steinurin er ein loftsteinur, so hvør veit? Í móti hesum bygningi í Mekka venda sær allir muslimar, líka mikið hvar á klótini teir eru staddir, tá teir biðja.

Á einum túri, ið eg var við japanskum tunfiskabáti, stóð eg har afturi á puppinum og roykti, á veg á fiskileið suður móti bretska markinum. Við hesum japanskum fiskiskipum vóru altíð fleiri indonesarar og vóru teir allir muslimar. Tá kom ein av hesum indonesarum, ein álvarsamur maður, og rullaði sína bønarmáttu út og skuldi til at biðja. Tá gjørdi eg hann varugan við at rætningurin var móti Suðurameriku og vísti honum rætningin til Mekka. Eg sá, hvussu takksamur hann varð, og ikki gloymdi hann mær tað aftur.

## Islam, kristindómur og jødadómur sama trúgv

Mohammed helt sjálvur islam, kristindóm og jødadóm at vera somu religión. Hann metti seg ikki at vera nakran religiónsstovnara, men sum síðsta profetin áðrenn dómadag. Jesus metti heldur ikki seg sjálvan at vera religiónsstovnara. Í so máta líkjast teir nógv, men um Muhammed hava vit nógva ítøkiliga vitan. Um Jesus als onga.


Bókmentir:
Erich Auerbach, Mimesis, Alber Bonniers Förlag, 1998
Koranin, týðing av K. V. Zetterstéen, Wahlstrøm & Widstrand, 2003
The Koran, , týðing av N. J. Dawood, Penguin Books, 1974
Karen Armstrong, Muhammed., Forum 2003